# Úttøkuskipan til EJM 2025 í Slovakia

Starvsnevnd SSF hevur samtykt fylgjandi kravtíðarskipan til Evropeisku JuniorMeistarastevnuna sum verður í Slovakia frá 1. til 6. juli 2025.

Uppá tal eru tey sum í kravtíðarskeiðnum klára avrik yvir 700 AQUA (2024) stig á langgeil (50m).

Sí AQUA 2024 talvurnar her:

- Kvinnur: World-Aquatics-Points-LCM_2024_Female-.pdf
- Menn: World-Aquatics-Points-LCM_2024_Male-.pdf

Dømi: Pál Joensen hevur svomið besta føroyska avrik yvirhøvur, sum var 14:46.33 í 1500 frí á langgeil á HM í Shanghai í 2011, sum tá gav 960 AQUA stig meðan talvurnar nú siga 949 AQUA stig.

Vit kunnu í mesta lagi melda fýra (4) svimjarar av sama kyni til hvørja grein, og verða fýra (4) teir skjótastu tí valdir ífall at fleiri enn fýra (4) klára kravtíðina til somu grein.

Starvsnevndin tilskilar sær rætt at taka út eyka svimjarar, sum lýst í úttøkuskipanini til eyka úttøkur:

https://ssf.fo/kapping/uttokuskipan-til-eyka-uttokur/

Starvsnevndin tilskilar sær hartil rætt at meta um venjingarstøðið hjá viðkomandi svimjarum, út í frá úrslitum svomin síðani 1. januar 2025, og at velja luttøku frá um serligar umstøður tala fyri hesum.

Kravtíðarskeiðið er frá og við 2. juli 2024 (EJM 2024), til og við 26. apríl 2025 (Tórshavn Open 2025)

Árgangirnir eru svimjarar føddir 2007-2011.

Sí annars "Reglugerð um úttøku og kravtíðir":
http://www.ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/reglugerd-um-uttoeku-og-kravtidir/

Feløgini verða biðin um at fráboða Svimjisambandinum um teir svimjarar ið hava klárað kravtíð, við tilskilan av grein og tíð, umframt nær og hvar tíðin varð svomin.

Viðkomandi landslið verður úttikið sum skjótast aftaná at kravtíðarskeiðið er runnið.

Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum.

Við svimjikvøðu

Starvsnevnd SSF

ATLANTIC AIRWAYS